**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0656**
**Tíðarskeið: 16-28/8 2006**

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Lis Larsen, Rógvi Mouritsen, Marit Pedersen og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Magakanningar skulu eisini gerast av toski, hýsu og upsa. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd, og tilfar til aldursgreining av havtasku og svartkjafti skal eisini fáast til vega. Haraftrat skal gulllaksur frystast til nærri kanningar í landi.

**Reiðskapur og útgerð:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Vanligur grunnur.

**Um túrin:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Hetta er 11. árið, har gjørdir verða tveir túrar á 2 vikur og við 200 trolstøðum íalt. Støðirnar liggja spjaddar kring allan Landgrunnin, og tóvað verður í 1 tíma so vítt møguligt á sama tóvi ár undan ári (Mynd 1). Arbeitt verður alt samdøgrið. Vegna maskinbrek vórðu bert 92 trolstøðir tiknar á tí fyrra túrinum, so til hendan túrin vóru 108 trolstøðir eftir; tær lógu norðan-, vestan- og sunnanfyri.




**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á sumri við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 200 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

Farið varð av Havnini á midnátt 17-18/8, og kastað varð fyrstu ferð kl. $01^{51}$ beint eystan fyri Sandoynna (stratum II). Mikumorgunin 23/8 vóru vit á Sørvági og landaðu. Fóru út aftur beinanvegin, og byrjaðu aftur vestan fyri Saksun seinnapartin. 27/8 kl. $23^{09}$ vóru allar støðirnar tiknar, og kós varð sett á Havnina, har vit komu mánamorgunin kl. $03^{30}$. Landað varð á Havnini sama dag.
Tað viðraði væl allan túrin, og túrurin sum so gekst hampiliga væl, tí tað eydnaðist at taka tær ætlaðu 108 trolstøðirnar. Men 14 tóv miseydnaðust vegna skræðing og slitnar breitlar, tí tað kom fast í botn, og tey máttu tí gerast umaftur; umframt mátti 1 tóv mátti gerast umaftur, tí telduskrásetingin miseydnaðist undir prøvatakingini. Eins og í fjør varð ein eyka støð eystanfyri Sandoynna í staðin fyri eina av vanligu støðunum í Sandshavinum.
Eitt yvirlit yvir allar støðir á yvirlitstrolingunum á sumri er í túrætlanini fyri hendan túrin (0656) og á Mynd 1.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum sæst í talvu 1. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð sum vant eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar tiknir av tí nytraða fiskinum. Umframt vanligar lívfrøðiligar prøvar av øllum fiskasløgum vóru prøvar til aldursgreiningar eisini tiknir av havtasku og svartkjafti, og prøvar av gulllaksi vórðu frystir til nærri kanningar í landi.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 0656.

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Svartkjaftur | Havtaska |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski |
| 666 | 108 | 649 | 116 | 690 | 118 | 74 | 57 |

| | |
|---|---|
| Tal á nytraðum fiski tilsamans: | 2136 |
| Tal á magum tilsamans: | 342 |

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miðað verður eftir, at túrurin er klárur at leggja í basu í november.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrinum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Í talvu 2 er tó eitt yvirlit yvir øll sløgini, ið vórðu fingin á hesum túrinum, hvussu nógv varð fingið av hvørjum slagi, og á hvussu nógvum støðum tey vórðu fingin. Nógv mest varð fingið av upsa, men nógv varð eisini fingið av hýsu og lítla kongafiski; síðani komu toskur, gulllaksur, hvítingsbróðir, stóri kongafiskur og svartkjaftur. 45 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt høgguslokk (mathøgguslokkur, agnhøgguslokkur og Eledone), hummara, rækju, jákupsskel og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, krossfiskar og igulker. Um hugt verður at, hvussu títtleikin er av teimum ymsu sløgunum, t.e. á hvussu nógvum støðum, tey koma fyri, so varð upsi fingin á 96% av teimum 108 støðunum. Síðani kemur m.a. lítli kongafiskur (91%), hýsa (85%) og toskur og hvítingsbróðir (81%).

Við at bera saman við stovnsmetingarnar, ið verða gjørdar á hvørjum ári, og við veiðutøl hjá fiskiflotanum (veiða upp á roynd) , er greitt, at yvirlitstrolingarnar geva eina góða mynd av, hvussu stórir stovnarnir av toski og hýsu eru. Eisini geva tær ábendingar um, hvussu aðrir stovnar eru fyri, m.a. upsi. Á mynd 2 er veiðan pr. støð av úrvaldum sløgum frá

báðum túrunum í summar víst samanborið við túrarnar á sumri síðani 1999. Fyri tosk hevur lítið verið at fingið síðani 2003, og í ár fór úrslitið niður í eina helvt av støðinum í 2003-2005; yvirlitstrolingarnar staðfesta sostatt, at toskastovnurin á landgrunninum ikki er væl fyri og enn minni, enn tá stovnsmetingar og ráðgeving vórðu gjørd fyrr í ár. Hýsustovnurin tykist enn at vera hampiliga væl fyri, hóast hann hevur verið í minking seinastu 4 árini. Hetta er í trá við stovnsmetingina fyrr í ár, har framskriving vísti, at vegna vánaliga tilgongd vil stovnurin mest sannlíkt minka skjótt; sera lítið varð fingið av smáari hýsu (0-2 ára gomul). Væl meira fekst av upsa í ár í mun til í fjør, og hóast úrslit viðvíkjandi upsa frá tílíkum yvirlitstrolingum skulu takast við fyrivarni, so er fyribils niðurstøðan, at stovnurin er hampuliga væl fyri. Fyri onnur fiskasløg skal nevnast, at kalvi og reyðsprøka hava staðið í stað ávikavist seinastu 3 og 5 árini, men at tunga er í minking. Hóast minni enn fyrr í nítiárunum, tykist stóri kongafiskur at vera hampuliga væl fyri, meðan sama ikki er galdandi fyri trantkongafisk, ið stendur í stað á einum lágum støði eftir støðuga minking í nógv ár. Lutfalsliga nógv er fingið av longu og brosmu síðani 2004, hóast 2006 er nakað minni enn hini bæði árini. Hampuliga væl tykist vera til av hvítingsbróðri, meðan svartkjaftur er minkaður nógv seinastu 3 árini.

Magakanningar vístu, at fiskurin hevði nokk at eta, og sum heild var fiskurin væl í holdum. Tó vóru flatfiskar sum tunga, reyðsprøka og kalvi heldur rak

Fiskirannsóknarstovan, 7. september 2006

<u>Jákup Reinert</u>

| Talva 2. | Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á MH túri nr. 0656 | | |
|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **Veiða, kg** | **Veiða pr støð, kg** | **Støðir við fiski, %** |
| Upsi | 30785.332 | 285.049 | 96 |
| Hýsa | 13447.846 | 124.517 | 85 |
| Lítli kongafiskur | 10921.491 | 101.125 | 91 |
| Toskur | 3584.690 | 33.192 | 81 |
| Gulllaksur | 3395.933 | 31.444 | 47 |
| Hvítingsbróðir | 2638.853 | 24.434 | 81 |
| Stóri kongafiskur | 2225.637 | 20.608 | 51 |
| Svartkjaftur | 1452.817 | 13.452 | 58 |
| Havmús | 891.259 | 8.252 | 8 |
| Longa | 801.001 | 7.417 | 66 |
| Hvítingur | 726.843 | 6.730 | 42 |
| Tunga | 421.705 | 3.905 | 62 |
| Reyðsprøka | 294.222 | 2.724 | 32 |
| Blálonga | 283.963 | 2.629 | 20 |
| Trantkongafiskur | 257.695 | 2.386 | 17 |
| Havtaska | 257.490 | 2.384 | 31 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 215.206 | 1.993 | 11 |
| Skrambul | 195.660 | 1.812 | 44 |
| Kalvi | 189.414 | 1.754 | 23 |
| Brosma | 163.763 | 1.516 | 40 |
| Sandsprøka | 148.678 | 1.377 | 26 |
| Rossamakrelur | 130.231 | 1.206 | 12 |
| Knurrhani | 81.856 | 0.758 | 18 |
| Steinbítur | 66.664 | 0.617 | 16 |
| Lálla | 58.100 | 0.538 | 8 |
| Silvurmurtur | 46.925 | 0.434 | 16 |
| Glaskvoysa | 26.300 | 0.244 | 8 |
| Makrelur | 24.371 | 0.226 | 11 |
| Skøta | 23.445 | 0.217 | 4 |
| Hvassasprek | 16.893 | 0.156 | 7 |
| Agnhøgguslokkur | 16.084 | 0.149 | 4 |
| Lýrur | 14.075 | 0.130 | 2 |
| Úlvfiskur | 10.220 | 0.095 | 1 |
| Mathøgguslokkur | 9.882 | 0.091 | 7 |
| Lítla brosma | 9.646 | 0.089 | 2 |
| Glýsufiskur | 5.996 | 0.056 | 4 |
| Sild | 5.419 | 0.050 | 9 |
| Lýsingur | 4.875 | 0.045 | 1 |
| Tindaskøta | 4.457 | 0.041 | 5 |
| Kjaftsvarti hávur | 3.800 | 0.035 | 2 |
| Bláriddari | 2.856 | 0.026 | 1 |
| Hummari | 2.271 | 0.021 | 4 |
| Svartfiskur | 2.135 | 0.020 | 2 |
| Ferhyrnta hornabrosma | 2.056 | 0.019 | 1 |
| Svartkalvi | 1.985 | 0.018 | 1 |
| Jákupsskel | 0.287 | 0.003 | 1 |
| Búksvarti hávur | 0.253 | 0.002 | 1 |
| Rækja | 0.214 | 0.002 | 1 |
| Murrikrutt | 0.195 | 0.002 | 6 |
| Rognkelsi | 0.044 | 0.001 | 1 |
| Nebbasild | 0.017 | 0.000 | 1 |
| Eledone | 0.004 | 0.000 | 1 |




**Mynd 2**. Fyribils úrslit frá yvirlitstrolingunum á sumri við Magnusi Heinasyni síðani 1999 fyri úrvald fiskasløg.